# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# Ársfrágreiðing 2015

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnuhúsið
Óðinshædd 7
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

# Frágreiðing frá nevndini

Staðfestast kann, at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum frá føroysku vinnuni veruliga hevur tikið seg uppaftur.

Arbeiðsloysið er fallið nógv, í mun til tá tað var hægst. Um hesa tíðina í fjør var arbeiðsloysi 3,1 %, meðan tað í november 2015 var 2,3 %, sum er nýggjasta arbeiðsloysistal frá Hagstovuni. Helst er talið lækkað enn meira síðan november. Hetta er gott, men tað er alsamt torførari at fáa fatur á røttu arbeiðsmegini ikki bara til handverksvinnuna, men eisini til aðrar partar av vinnuni.

Tilsamans vóru lønargjaldingarnar í 2015, knappar 500 mió kr. ella 4 % hægri enn í 2014. Verður bert hugt eftir lønargjaldingunum frá vinnuni í 2015 í mun til 2014 sæst, at lønargjaldingarnar eru vaksnar við 8 %.

Verður hugt nærri eftir tølunum sæst, at tað serliga er fiskiveiða og byggivinna, sum hava stóran vøkstur, men yvirhøvur er øking í lønargjaldingunum í øllum vinnugreinum.

Innan tað almenna er vøkstur í lønargjaldingunum góðar 100 mió kr, og er vøkstur á øllum økjum. Serliga er tað ein vøkstur í lønargjaldingunum innan landsfyristitingina, men kommunur, ríkisstovnar og heilsuverk hava eisini ein vøkstur í lønargjaldingunum.

Tann parturin av fiskivinnuni, sum fiskar undir Føroyum hevur enn stórar avbjóðingar. Fiskiskapurin er framvegis sera vánaligur. Í 2015 er feskfiskaveiðan fyrstu ferð í fleiri ár økt nakað, hóast árliga veiðan framvegis kann samanberast við veiðuna í ringastu kreppuárunum fyrst í 90'unum. Feskfiskaveiðan var í 2015 góð 70.000 tons, eini 2.000 tons meira enn í 2014, sum tó var tað lægsta í nógv ár. Serliga tá tað snýr seg um botnfiskasløgini tosk og hýsu, er framvegis ringur standur. Hóast nøgdin av toski hækkaði nakað í 2014, er veiðan framvegis lítil. Nøgdin av hýsu var at kalla óbroytt. Nøgdin av upsa øktist við góðum 1.000 tonsum, men er tó framvegis munandi lægri enn fyri fáum árum síðani, hóast stovnurin skal eitast at vera hampuliga væl fyri.

Havstovan sigur í tilráðingunum, at upsastovnurin er hampiliga væl fyri, meðan støðan í hýsu- og toskastovnunum er sera ring. Tilgongdin av toski og hýsu hevur ongantíð fyrr í so nógv ár ár rað svikið, og eingi útlit eru til bata komandi árið.

Samlaða útflutningsvirðið á øllum fiskavørum, íroknað aldan laks, var í 2015 umleið 6,7 mia. kr. í mun til umleið 6,2 mia. kr. í 2014. Útflutningsvirðið á alilaksi er minkað við 150 mió. kr. í sama tíðarskeiði, so tað hevur verið ein vøkstur í útflutningsvirðinum av veiddum fiski á umleið 650 mió. kr. tilsamans.

Alivinnan hevur havt góðar marknaðartreytir seinastu árini. Útlitini fyri 2015 vóru góð, og samlaða tøkan var 66.000 tons í kruvdari vekt í mun til 70.000 tons í 2014. Um hugt verður eftir útflutningsvirðinum frá alivinnuni, sæst at parturin av útflutninginum frá alivinnuni nú er út við 50 % av samlaða føroyska útflutninginum. 2015 gjørdist tí enn eitt met gott ár hjá alivinnuni.

Sum heild gongur tað eisini væl lívfrøðiliga í alivinni. Tó er størsta og einasta stóra lívfrøðiliga avbjóðingin laksalús. Alivinnan samstarvar um at tálma og loysa hesa stóru avbjóðing, og verða stórar íløgur gjørdar fyri at koma trupulleikanum til lívs.

Byggivinnan er komin seg aftur síðan truplu tíðina, sum byrjaði í 2009. Lønargjaldingarnar í 2015 í mun til 2014 er vaksnar við umleið 50 mió. kr. og eru nú á sama støði, sum tær vóru í 2008. Byggivinnuni tørvar tó framvegis arbeiðsmegi, og Føroya Arbeiðsgevarafelag óttast fyri, at lønarglíðing fer fram orsakað av hesum.

Gleðiligt er at síggja, at eisini innan aðrar vinnugreinar so sum ferðavinnu, handilsvinnu, ídnaðarvinnu veksur virksemið. Veitingarvinnan til oljuvinnuna hevur tó stórar avbjóðingar, og roknað verður ikki við stórvegis broytingum hesum viðvíkjandi komandi árið.

## Føroyski arbeiðsmarknaðurin í 100 ár, marknaðaratgongd fyri fiskavørur og kommunuval til heystar

Ein týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at taka ábyrgd av arbeiðsmarknaðar og vinnupolitisku kørmunum, sum vinnan arbeiðir undir.

Ørkymlandi er, at einasta loysnin fyri at fáa javnvág í landskassan, sum politiska skipanin sær, er at leggja fleiri gjøld á vinnuna. Hækking av barsilsgjaldinum, gjaldinum til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Kring-varpsgjaldinum er ein partur. Annar partur er tilfeingisgjøldini, sum hava verið alsamt

vaksandi, og lítil áhugi tykist vera fyri at skapa vinnuni tryggar karmar.

Nýskipan av almenna partinum av búskapinum er tó ikki til at fáa eyga á. Neyðugt er at fáa tamarhald á almennu útreiðslunum, soleiðis at betri samsvar er ímillum inntøkur frá skatti og avgjøldum, og útreiðslurnar hjá almenna kassanum.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um tilfeingis- og loyvisgjøld á fiski- og alivinnu, møguleikarnar í byggivinnuni umframt skattaskipanina til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag valt at seta ljósið á hesi trý mál: føroyski arbeiðsmarknaðurin í 100 ár, marknaðaratgongd fyri fiskavørur, og stóru ábyrgdina kommunurnar hava, nú val verður til heystar.

## Støða Føroya Arbeiðsgevarafelags er:

- at politiski myndugleikin skal virða grundleggjandi rættindi hjá arbeiðsmarknaðinum at skipa viðurskiftini sínamillum, og at partarnir á arbeiðsmarknaðinum altíð verða tiknir við í arbeiðið at gera lógir á økinum. Somuleiðis heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at føroysku fakfeløgini áttu at lagt seg eftir at samskipa seg meira.
- Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til at kommunur ikki yvirbjóða hvørja aðra yvir evni uttan at taka atlit til kostnaðarstøði og fígging av hesum tænastum. Somuleiðis mugu kommunurnar luttaka í skattaumskipanararbeiðnum og gera sítt til, at ein skattaumskipan, sum kemur borgarunum til góðar, verður gjørd. Harafturat heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at kommunurnar í nógv størri mun mugu leggja seg eftir at útveita tænastuveitingar.
- Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at tað áhaldandi verður arbeitt við handilsavtalum við mest áhugaverdu marknaðirnar. Hesir eru serliga Turkaland, Kina, Suðurkorea og Eur-asiatisku búskaparsamgongan umframt enn betri marknaðaratgongd fyri virkaðar vørur til ES-marknaðin. Eisini má arbeiðsorka raðfestast í Uttanríkistænastuni og á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til at arbeiða við fríhandils- og heilsufrøðiligum avtalum við eitt nú Brasil og Australia, umframt onnur lond, sum hava týdning. Tað eigur at verða umhugsað at skipa sjálvstøðuga deild, sum kann tryggja, at tað áhaldandi verður arbeitt við at betra um marknaðaratgongdina og fylgja málunum upp.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingar við fakfeløgini er týdningarmiklasta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Samráðingarrundan 2014 – 2016 er nú liðug, og nýggj samráðingarrunda fyri 2016-2018 er byrjað.

Samráðingarnar við arbeiðarafeløgini endaðu 6. mai, tá semju um nýggjar 2-ára sáttmálar varð undirskrivað. Úrslitið var ein útreiðslukarmur á 2,2 % fyrra árið og 2,3 % seinna árið. Semjan við arbeiðarafeløgini leggur støði undir øllum samráðingunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag samráðingarrunduna 2016 – 2018, og verður hetta sostatt útreiðslukarmurin alla runduna.

Undir sáttmálasamráðingunum í 2014 ynsktu handverkarafeløgini at samráðast um lønarkarm saman við arbeiðarafeløgunum. Hetta góðtóku Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag treytað av, at tey samráddust sum ein partur, soleiðis at tey høvdu felags støðutakan til møguliga semju.

Arbeiðarafeløgini og handverkarafeløgini skuldu boðað Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag frá, hvørt tey vóru samd um ein nýggjan samráðingarleist fyri 1. januar 2016. Hetta bar tíverri ikki á mál, og tí verður karmurin framhaldandi lagdur í samráðingunum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini.

6. juni 2016

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Bergur Poulsen, formaður

# INNIHALDSYVIRLIT

**FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI** .... 2

*Føroyski arbeiðsmarknaðurin í 100 ár, marknaðaratgongd fyri fiskavørur og kommunuval til heystar* .... 2
*Støða Føroya Arbeiðsgevarafelags er:* .... 1
*Sáttmálasamráðingar* .... 1

**INNGANGUR** .... 6

**HVAT ER NÚ AT GERA? TILMÆLI FRÁ FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** .... 7

ARBEIÐSMARKNAÐURIN Á LANDI VERIÐ SKIPAÐUR Í 100 ÁR .... 7
*Støða Føroya Arbeiðsgevarafelags:* .... 8
FRAMVEGIS OV LÍTIÐ GJØRT VIÐ MARKNAÐARATGONGD .... 8
*Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag* .... 9
NÚ ER SKJÓTT KOMMUNUVAL .... 9
*Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag:* .... 10

**MÁL Í 2015 OG 2016** .... 11

**SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR 2015 - 2016** .... 13

*Samráðingarrundan 2014 - 2016* .... 13
*Samráðingar við Føroysk Miðlafólk* .... 13
*Samráðingar við Flogskiparafelag Føroya* .... 13
*Samráðingarrundan 2016 - 2018* .... 13
*Karmurin* .... 13
*Samráðingar við arbeiðarafeløgini* .... 13
*Samráðingar við Maskinmeistarafelagið* .... 13
*Komandi sáttmálasamráðingar* .... 14

**TILTØK 2015-2016** .... 15

*Vinnunám* .... 15
*Heimleiðis tiltøk í Vinnuhúsinum* .... 15
*Vinnudagurin 2015* .... 15

**GONGDIN INNAN YMISKU VINNUGREINARNAR** .... 18

FISKI- OG FLAKAVINNAN .... 18
FLAKAVINNAN .... 20
HAVBÚNAÐUR .... 22
HANDVERKSVINNAN .... 24
SHIPPINGVINNAN .... 26
OLJUVINNAN .... 27
KT-VINNAN .... 27
SAMSKIFTISVINNAN .... 28
RÁÐGEVARAVINNAN .... 28
HANDILSVINNAN .... 28
FERÐAVINNAN .... 30
UPPISJÓVARVINNAN .... 32
ÍDNAÐARVINNAN .... 32

**UM FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG, VINNUHÚSIÐ OG FELØGINI ANNARS** .... 34

**HVØR HÚSAST Í VINNUHÚSINUM?** .... 35

**NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** .... 36

## Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild grundarlagið undir samfelagnum.

Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags verða á hvørjum ári staðfest í ársfrágreiðingini og annars so hvørt á heimasíðu felagsins www.industry.fo.

Í ársfrágreiðingunum undanfarin ár og í frágreiðingum frá felagnum annars eru eisini sjónarmið felagsins um allar tættir, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hava týdning fyri føroysku vinnuna og samfelagið.

Hetta ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu og eitt burðardygt vinnulív eru nær tengd at gongdini í samfelagnum.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðs-gevarafelag hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um tilfeingis- og loyvisgjøld á fiski- og alivinnu, møguleikarnar í byggivinnuni umframt skattaskipanina til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini fyri 2015 nýtir Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at koma við sínum sjónarmiðum um, hvørji viðurskifti tørvur eisini er á at vísa ans komandi tíðina. Hetta verður gjørt fyri at skapa kjak um loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit fáa eitt gott og sterkt grundarlag undir tí búskaparvøkstri, sum vit nú hava.

Tað eru óivað onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ár valt at seta sjóneykuna á hesi:

- Føroyski arbeiðsmarknaðurin í 100 ár
- Marknaðaratgongd fyri fiskavørur
- Kommunuval til heystar

# Hvat er nú at gera? Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

## *Arbeiðsmarknaðurin á landi verið skipaður í 100 ár*

Í ár eru 100 ár síðan, at føroyski arbeiðsmarknaðurin á landi av álvara byrjaði at skipað seg.

Hetta hendi, tá fyrsti sáttmáli millum eitt fakfelag øðrumegin og eitt arbeiðsgevarafelag hinumegin varð undirskrivaður 7. februar 2016. Feløgini, sum undirskrivaðu sáttmálan, vóru Havnar Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag, sum bæði vóru stovnað sama árið.

Fyrstu sáttmálarnir snúu seg einamest um løn og arbeiðstíðir. Við tíðini eru karmarnir kring sáttmálar og sáttmálasamráðingar vorðnir meira fastir, og semja hevur í stóran mun verið um, hvussu hesi viðurskifti eiga at vera skipað. Føroyski arbeiðsmarknaðurin er nú skipaður við arbeiðsgevarafeløgum, fakfeløgum og arbeiðsmarknaðarlógum og -stovnum.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skipa seg í stóran mun sjálvir, tá tað kemur til lønar- og setanarviðurskifti hjá løntakarum og viðurskifti millum arbeiðsgevarafeløg og fakfeløg. Harafturat hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum, bæði almennu og privatu, við Fasta Gerðarrætti gjørt sáttmála um skipaða trætuloysn.

Tá tað kemur til meira samfelagsyvirskipað viðurskifti, eru hesi skipað í lógum, sum vanliga verða gjørdar í tøttum samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Nevnast kann, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru umboðaðir í nevndum og ráðum, har viðurskifti við ávirkan á arbeiðsmarknaðin verða viðgjørd.

## Politiska skipanin og arbeiðsmarknaðurin

Føroya Arbeiðsgevarafelag má tó staðfesta, at tað sær út til, at tað hjá politisku skipanini knípur við at virða ta siðvenju, sum í nógv ár hevur myndað føroyska arbeiðsmarknaðin og lógarsmíð við ávirkan á henda. Tíverri eru fleiri enn eitt dømi um, at arbeiðsmarknaðarlóggáva verður broytt, uttan at partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir við uppá ráð. Hetta er ógvuliga óheppið, tí hesar broytingar hava stóra ávirkan á leikararnar á arbeiðsmarknaðinum, og hvussu hesi skipa síni viðurskifti. Nevnast kann m.a. hækkingin í inngjaldinum til Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnin, sum kann ávirka eftirlønarskipanina, sum fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg hava avtalað í sáttmálunum sínamillum. Annað dømi er broytingar í barsilslógini, sum hava verið skundaðar ígjøgnum, uttan at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fingu veruligan møguleika at koma við viðmerkingum.

Eisini er dømi um lóggávu, har landsstýrið á fiskivinnuøkinum hevur lagt seg beinleiðis út í rættin hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at skipa løn- og arbeiðsviðurskifti síni. Rætturin at samráðast er grundleggjandi fyri arbeiðsmarknaðin, og tað kennist hugstoytt, at virðingin fyri arbeiðsmarknaðinum er so lítil, at hesin rættur bara verður kveistraður til viks. Ivasamt er, um politiska skipanin yvirhøvur gevur sær far um avleiðingarnar av, at arbeiðsmarknaðarbygnaðurin verður brotin niður.

## Ábyrgdin hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum

Eins og tað hevur týdning, at politiska skipanin virðir bygnaðin á arbeiðsmarknaðinum, hevur tað ikki minni týdning, at arbeiðsmarknaðarpartarnir eru tilvitaðir um, hvørjum landslagi teir virka í. Løtuvinningur kann stundum tykjast betri enn langtíðar javnvág og friður. Eitt arbeiðsgevarafelag og eitt fakfelag hava nakrar grundleggjandi uppgávur, sum tey eiga at kenna og vera før fyri at loysa. Kjarnuuppgávurnar eru sáttmálasamráðingarnar, samspæli við politisku skipanina og limarøkt.

Á privata arbeiðsmarknaðinum á landi eru nú 39 sáttmálar, millum 20 fakfeløg øðrumegin og eitt yvirskipað arbeiðsgevarafelag hinumegin. Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at tað hevði verið ein fyrimunur um fakfelagssíðan skipaði seg í størri eindir, soleiðis at hesar veruliga kundu virkað fyri einum framhaldandi skipaðum arbeiðsmarknaði. Tað kemur meira enn so fyri, at týdningarmikil arbeiðsmarknaðarlóggáva ikki verður viðgjørd í fakfeløgunum, og er hetta ógvuliga óheppið. Harafturat hevur tað týdning fyri fakfeløgini framhaldandi at varðveita sína styrki, til tess at røkja síni áhugamál og sín leiklut bæði mótvegis arbeiðsgevarum, men sanniliga eisini í sjálvari skipanini, tey virka í.

## Friður á arbeiðsmarknaðinum ongin sjálvfylgja

Tað er ikki ein sjálvfylgja, at friðarligi føroyski arbeiðsmarknaðurin, sum er bygdur upp hesi seinastu 100 árini, heldur fram. Um ikki bæði arbeiðsgevarasíðan, fakfelagssíðan og politiska skipanin kenna spælireglurnar og sína ábyrgd, er tíverri sannlíkt, at føroyski arbeiðsmarknaðurin fær stórar avbjóðingar í tíðini, sum kemur. Verður tann javnvág, sum enn er millum arbeiðsgevarafeløg, fakfeløg og politisku skipanina, brotin, er vandi fyri, at tað verða fleiri arbeiðssteðgir, fleiri stríðsmál og størri órógv á arbeiðsmarknaðinum, og hesum er føroyska samfelagið als ikki tænt við.

### Støða Føroya Arbeiðsgevarafelags:

- Politiski myndugleikin skal virða grundleggjandi rættindi hjá arbeiðsmarknaðinum.
- Partarnir á arbeiðsmarknaðinum altíð verða tiknir við í arbeiði at gera lógir á økinum.
- Føroysku fakfeløgini áttu at lagt seg eftir at samskipa seg meira.

## *Framvegis ov lítið gjørt við marknaðaratgongd*

Í politisku skipanini verður ofta kjakast um, hvussu vit fáa størri virðisvøkstur í føroysku fiskivinnuna. Sjáldan verður spurningurin um marknaðaratgongd tikin nakað serligt fram í hesum sambandi[1]. Marknaðaratgongdin kann tó vera týðandi fyri virðisvøksturin. Fáa vit eina fríhandilsavtalu við eitt land, so fáa vit beinanvegin størri virði burturúr okkara fiskavørum, og fáa vit atgongd til nýggjar marknaðir gjøgnum nýggjar veterineravtalur, hava vit størri møguleika at fáa rætta prísin fyri útflutningsvørurnar, umframt at vit gerast minni heft at ávísum marknaðum. Harumframt er marknaðaratgongdin eisini avgerandi fyri, í hvønn mun vit kunnu virðisøkja fiskavørurnar til eitt nú ES-marknaðin.

Tað er ein torfør uppgáva at skulu betra um marknaðaratgongdina fyri føroyskar vørur, tí orsakað av støddini á føroyska marknaðinum koma Føroyar ikki í fremstu røð, tá onnur lond skulu raðfesta, hvørjar handilsavtalur skulu gerast. Tó vísa royndirnar við nýggju fríhandilsavtaluni við Turkalandi, at tað ber til at fáa fríhandilsavtalur. Arbeiðið við marknaðaratgongd virkar tó framvegis ov óskipað og lítið raðfest.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í mai 2016 kannað, hvørjar marknaðir útflytarar av fiskavørum halda vera serliga áhugaverdar at fáa betri marknaðaratgongd til. Kanningin er ein dagføring av líknandi kanning, sum varð gjørd í 2014.

Nýggja kanningin vísir, at lítið er broytt síðani 2014. Tað er framvegis Turkaland, sum flestar fyritøkur kundu hugsað sær betri marknaðaratgongd til. Síðani 2014 er tað hent, at Føroyar og Turkaland hava undirskrivað fríhandilsavtalu, og er henda avtala góðkend av Løgtinginum. Fyri at avtalan skal fáa gildi, er tó eisini neyðugt at turkiska tjóðartingið góðkennir avtaluna, og tað er ikki hent enn.

Næst á ynskilistanum hjá føroyskum fiskaútflutningsfyritøkum er Brasilia, har forðingin serliga er vantandi veterineravtala millum føroyskar og brasilskar myndugleikar. Við sínum stóra fólkatali og vaksandi miðalklassa er Brasilia áhugaverdur marknaður fyri fiskaútflytarar kring heimin, og m.a. Noreg og Danmark brúka nógva orku uppá at marknaðarføra fiskavørur í Brasilia. Serstakt við Brasilia er eisini, at tey eta nógvar saltaðar fiskavørur. Hóast búskaparstøðan í løtuni ikki er so góð í Brasilia, hevur tað týdning at fáa latið marknaðin upp, so møguleiki er at selja, tá støðan batnar.

Kina er eisini ovaliga á listanum yvir lond, sum ynski er um at fáa betri marknaðaratgongd til. Hóast Føroyar í løtuni ikki hava trupulleikar á kinesiska marknaðinum, er framvegis eitt ynski hjá fleiri fyritøkum um at fáa í lag eina fríhandilsavtalu við Kina.

Sum nakað nýtt er áhugin fyri at útflyta til Suðurkorea vaksandi millum føroyskar fiskaútflytarar. Suðurkorea er eitt av teimum londunum í heiminum, har fólkið etir mest fiskavørur, um roknað verður í mun til fólkatalið. Í løtuni viðførir vantandi fríhandilsavtalan við

[1] Í frágreiðingini *Vøkstur í Fiskivinnuna*, sum Fiskimálaráðið gav út fyrr í ár, verður tó mælt til at skipa arbeiðið við betri marknaðaratgongd

Korea, at føroyskar fiskavørur ikki eru kappingarførar. Tollurin á føroyskar fiskavørur er omanfyri 20%, meðan fleiri kappingarneytar ongan toll rinda.

Av øðrum londum, sum áhugi er fyri at fáa betri handils- og/ella veterinerviðurskifti við, verða nevnd Australia, Teivan, Eurasiatiska búskaparsamveldið (Russland v.fl.), ES (virkaðar fiskavørur) og onnur lond í fjareystri, sum eitt nú Vietnam.

Eisini aðrar forðingar eru fyri útflutningi enn handils- og veterineravtalur. M.a. verður í kanningini nevnt, at tað kann vera torført at útflyta fisk til USA, um fiskiskapurin ikki er MSC-góðkendur. Eisini verður sagt, at góðskan á ráfiski í summum førum ikki er nóg góð til at selja til mest kræsnu og best gjaldandi marknaðirnar, sum t.d. Japan. Í mun til útflutningin av fiskavørum til ES nevna fleiri virki tær tungu føroysku mannagongdirnar í sambandi við IUU-váttanir (Illegal, Unreported, Unregulated) í mun til meira smidligar mannagondir í øðrum londum. Harumframt er vantandi eksportkreditt til ávísar marknaðir ein forðing, eitt nú Ukreina.

## Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at:

- tað áhaldandi verður arbeitt við handilsavtalum við mest áhugaverdu marknaðirnar, t.v.s. serliga Turkaland (fáa ratifiseringina í Turkalandi uppá pláss), Kina, Suðurkorea og Eur-asiatisku búskaparsamgonguna (Russland v.fl.). Eisini hevur tað týdning av fáa betri marknaðaratgongd fyri virkaðar vørur til ES-marknaðin.
- arbeiðsorka verður sett av á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til at arbeiða við heilsufrøðiligum avtalum við eitt nú Brasilia og Australia, umframt onnur lond, sum hava týdning. Tað eigur at verða umhugsað at skipa sjálvstøðuga deild, sum kann tryggja, at tað áhaldandi verður arbeitt við at betra um marknaðaratgongdina og fylgja málunum upp.
- mannagongdirnar í sambandi við útflutning verða gjørdar so smidligar sum gjørligt.
- tað verður orðaður ein útflutningspolitikkur við einari ítøkiligari ætlan, sum viðger mest vanligu útflutningsforðingarnar, og hvat kann verða gjørt við tær.

## *Nú er skjótt kommunuval*

Nú kommunuval er í hondum, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað er neyðugt at minna kommunurnar á ábyrgdina, tær hava. Ábyrgdina fyri at skapa borgarum og vinnu neyðugar dygdargóðar tænastur við virðing fyri skattakrónunum.

Gongd er í føroyska búskapinum, og í kommununum er fokus á at hava virksemi og góðar treytir til íbúgvarnar. Hetta hevur elvt til, at kommunurnar seinasta árið ella so hava lagt enn størri dent á at kappast um borgaran. Tilboð um ókeypis tænastur til tilflytarar og barnafamiljur hava fylt nógv, samstundis sum kommunurnar yvirtaka fleiri uppgávur, sum landið fyrr hevur havt.

Hetta er mikið gott, men tað hevur tó týdning, at eisini kommunurnar taka atlit. Tað er “no such thing as a free lunch”. Onkur skal gjalda gildið.

Um kommunur kappbjóða um at fáa talið av borgarum upp, verður lítið eftir at nýta til at gera karmarnar fyri vinnulívið í kommununi nóg gott. Eins og borgarar, velja eisini vinnufyritøkur, hvar tær vilja búgva. Her er tað ikki endiliga kostnaðurin á tænastunum, sum hevur týdning, men tað er týdningarmikið, at kommunur stuðla undir hugin at reka vinnu, at karmarnir eru teir røttu, og at hesir ikki verða broyttir óneyðuga ofta.

## Trýst er á kommunukassan

Føroyingar eru kendir fyri at vera sera flytfør arbeiðsmegi og flyta lættliga millum lond at arbeiða, uttan tó at flyta bústað. Henda arbeiðsmegi verður fyri tað mesta skattað í landinum, har arbeitt verður. Tey búgva tó framvegis í Føroyum, og tey brúka tær tænastur,

sum land og kommunur veita. Hetta leggur stórt trýst á serliga smærri kommunurnar um landið og økir skattatrýstið á tey, sum bæði búgva og arbeiða í Føroyum.

Samgongan hevur fráboðað, at farið verður undir at endurskoða skattaskipanina fyri síðan at fremja eina skattanýskipan. Tað er sera umráðandi, at kommunurnar vera við í hesum arbeiði og taka sín part av ábyrgdini fyri at tryggja øllum borgarum eins viðferð. Tað er eingin løtt loysn á hesum spurningi, tí føroyska samfelagið má eisini ansa eftir at varveita flytføri í arbeiðsmegini.

Hvar loysnin liggur, fer bólkurin, sum arbeiðir við skattanýskipanini, at greina, og Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er sera umráðandi, at hesin bólkur lýsir allar teir møguleikar, sum eru. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur eisini, at tað er umráðandi at taka atlit til, at føroyingar ikki verða skattaðir av landinum.

## Útveiting

Útveiting er besti mátin at fáa meira fyri minni. Vanligt er í øðrum londum at bjóða út uppgávur so sum reingerð, rakstur av kantinum, vaktartænastu, viðlíkahald av bygningum og uttanumøkjum, KT-tænastur og rakstur, koyring og verkstaðararbeiði, ráðgevingarvirksemi, skeiðvirksemi o.l. Tað vil siga alt, sum kann eyðmerkjast sum tænastuveitingar til sjálva myndugleikauppgávuna, sum ein almennur myndugleiki hevur. Seinastu árini hava grannalondini eisini útveitt kjarnutænastur so sum barnaansing og eldrarøkt.

Í Føroyum hevur útveiting ikki rættuliga vunnið frama. Ávís økir eru boðin út, eitt nú busskoyring, innsavning av ruski og partvíst reingerðing hjá kommunum og ferðafólkakoyring og frakt hjá tí almenna annars. Hetta hendi fyri nøkrum árum síðani, men tað sýnist sum um, at henda tilgongd nærum er steðgað upp.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er alneyðugt at arbeitt verður miðvíst fyri at fáa útveitt størri part av almennu tænastunum, til tess at fáa eina meiri effektiva og fleksibla tænastu til borgaran.

Endamálið við útbjóðing av almennum uppgávum er umvegis kapping at fáa størri effektivitet í tann almenna sektorin og tryggja, at almennir pengar og tilfeingi verða gagnnýtt á best møguligan hátt. Tað mest nærliggjandi í fyrsta umfari er at bjóða út tænastuveitingar og serliga hjálpiveitingar. Tað er í øllum førum her, at kommunur eiga at gera sær royndirnar við útveiting og so bíða við kjarnufunktiónunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at kommunurnar eiga at gera eina ætlan fyri útveiting av øllum tænastuveitingum, gera tíðarætlan og seta ítøkilig mál fyri, hvussu náast skal á mál við hesum.

Ein miðvís útveiting á kommunala økinum verður eisini viðvirkandi til vinnuligan vøkstur í kommununum og í landinum, og hetta førir tískil eisini til fólkavøkstur, tí spennandi starvsmøguleikar spyrjast burturúr slíkari tilgongd.

## Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag:

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at:

- kommunur ikki yvirbjóða hvørja aðra yvir evni,
- kommunurnar luttaka í skattaumskipanar-arbeiðnum, og
- kommunurnar mugu leggja seg eftir at útveita tænastuveitingar.

## Mál í 2015 og 2016

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verða nevnd yvirskipað mál frá farna ári, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av, og sum eru umráðandi fyri vinnuna.

Umframt tey mál, sum eru nevnd niðanfyri, geva Føroya Arbeiðsgevarafelag og hini feløgini í Vinnuhúsum hoyringssvar í sambandi við nýggjar lógir, kunngerðir, vegleiðingar v.m., sum koma frá politisku skipanini. Til ber at lesa øll hesi hoyringssvar á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo.

Javnan verður skipað fyri kunningartiltøkum um evni, sum eru viðkomandi fyri limir okkara. Hetta verður gjørt við sokallaðum heimleiðistiltøkum, sum verða fyriskipað seinnapartar nakrar ferðir um árið.

- Løgtingsval varð útskrivað eftir Ólavsøku í fjør. Í hesum sambandi varð gjørt av, at vinnugreinafeløgini í Vinnuhúsinum skuldu nýta høvi at seta fram síni ynskir til betraðar vinnukarmar. Hetta fyri at gera tey uppstillaðu varug við, at vinnuligir karmar eiga at vera eitt fokusøki hjá komandi politikkarum.

- Í sambandi við Løgtingsvalið setti Føroya Arbeiðsgevarafelag ein bólk við vinnuumboðum at hyggja uppá og koma við íkasti til skattakjakið undir valdystinum. Í bólkinum vóru Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petrolium, Christian Danielsen, stjóri á Vestpack, Fróði Magnussen, stjóri á formula.fo og Bergur Poulsen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

- Nýggja samgongan byrjaði valskeiðið við at áleggja arbeiðsmarknaðinum hækkað gjøld. Eitt av hesum var hækking av barsilsgjaldinum við 0.09% fyri at fíggja longt barnsburðarfarloyvi. Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørdi vart við, at neyðugt er at taka alla skipanina upp til endurskoðan í staðin fyri at halda fram við at pjøssa uppá skipanina.

- Kringvarpsgjaldið var umlagt galdandi frá 2016. Endamálið við umleggingini var at innheinta kringvarpsgjaldið umvegis skattin og at gera mun á gjaldinum alt eftir lønarinntøku. Kostnaðurin av hesi umlegging varð lagdur á vinnufyritøkur, sum nú yvirhøvur gjalda munandi hægri upphæddir í kringvarpsgjaldi.

- Inngjaldið frá arbeiðsgevara og arbeiðstakara til Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnin hækkaði 1. februar 2016 við 0,75% í part ella íalt 1,5%. Endamálið við hækkingini av gjaldinum til Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnin var at fíggja eina sparing í pensjónunum, sum varð gjørd samstundis. Hetta var eitt av teimum mongu lógaruppskotunum, sum ikki vóru send til hoyringar, áðrenn tað varð lagt fyri tingið.

- Í sambandi við arbeiðið at fáa yvirskot á fíggjarlógina í 2016, vórðu avgjøldini á brennievni hækkað. Hetta lógaruppskot varð heldur ikki sent til hoyringar.

- Vinnufelagalóggávan er dagførd. Dagføringin var ein liður í regluligu dagføringini, sum er gjørd av hesum økinum nú í mong ár. Nevnast kann, at hesu ferð varð ásett, at stórar fyritøkur skulu hava politik og máltal fyri kvinnur í ovastu leiðsluni og politik fyri samfelagsábyrgd. Somuleiðis er nú møguligt at stovna sokallaði íverksetarafeløg við 1 krónu í partapeningi, og krøv eru ásett um talgilt samskifti millum fyritøkur og almennar stovnar.

- Lógarverk um sokallaða royndaruppboðssølu av parti av fiskirættindunum til fiskiskap í Barentshavinum umframt av makreli, sild og svartkjafti fekk drúgva umrøðu bæði í almenninginum og í løgtinginum. Lógaruppskotið var ein uppílegging í frælsa samráðingar-rættin hjá arbeiðsmarknaðinum og í stríð við ásetingar í mannarættindasáttmálanum.

- Í vár hava uppskot um broytingar í matvørulóggávuni verið til viðgerðar. Endamálið við broytingunum var at betra um møguleikan hjá serføroyskum vørum í sambandi við framleiðsu og sølu.

- Útbjóðingarlógin varð broytt herfyri. Frá 1. januar 2017 verður kravið, at útbjóðingartilfarið skal vera á føroyskum máli. Somuleiðis er lógin broytt soleiðis, at tað fer at bera til at senda tilboð inn digitalt.

# Sáttmálasamráðingar 2015 – 2016

Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum tess varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt sáttmálunum fyri manningar við handilsskipum.

Største sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnu-felag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja tær støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

## Samráðingarrundan 2014 – 2016

Samráðingarrundan 2014 – 2016 endaði, tá Føroya Arbeiðsgevarafelag og Flogskiparafelagið skrivaðu undir sáttmála. Tá vóru tilsaman 40 sáttmálar undirskrivaðir síðan mai 2014. Karmurin í hesi runduni var 1,98% fyrra árið og 2,25% seinna árið.

## Samráðingar við Føroysk Miðlafólk

Hin 30. oktober 2015 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroysk Miðlafólk undir semju um nýggjan sáttmála. Partarnir vóru samdir um eina lønarhækking á 1,98% hin 1. november 2015 og 2,25% hin 1. november 2016.

Partarnir undirskrivaðu eisini avtalu um fráboðanarfreist í sambandi við verkfall.

## Samráðingar við Flogskiparafelag Føroya

Hin 25. mai 2016 varð sáttmáli undirskrivaður við Flogskiparafelag Føroya. Hetta hendi, eftir at neyðugt hevði verið at boðsenda seminsstovnin til tess at koma á mál við samráðingunum.

Sáttmálin gongur frá 1. apríl 2016 til 1. apríl 2018. Semjan hevur við sær eina lønarhækking á 2,25% hin 1. apríl 2016, sum svarar til seinna árið í undanfarnu samráðingarrundu, og 2,2% 1. apríl í 2017, sum svarar til fyrra árið í samráðingarrunduni, sum byrjaði 1. mai í ár. Harafturat er millum aðrar broytingar gjørdar tillaðingar í arbeiðsskipanini.

## Samráðingarrundan 2016 – 2018

Sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini gingu út 1. mai í ár. Tá samráðingarnar við hesi feløgini byrjaðu hin 29. mars byrjaði samstundis nýggj samráðingarrunda fyri teir tilsaman 40 sáttmálarnar, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag varðar av.

## Karmurin

Undir sáttmálasamráðingunum í 2014 ynsktu handverkarafeløgini at samráðast um karmin saman við arbeiðarafeløgunum. Hetta góðtóku Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag treytað av, at tey samráddust sum ein partur, soleiðis at tey høvdu felags støðutakan til møguliga semju.

Arbeiðarafeløgini og handverkarafeløgini skuldu boða Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag frá, hvørt tey vóru samd um ein nýggjan samráðingarleist fyri 1. januar 2016. Hetta bar tíverri ikki á mál, og tí verður karmurin framhaldandi lagdur í samráðingunum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini.

## Samráðingar við arbeiðarafeløgini

Samráðingarnar um sáttmálarnar millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og ávikavist Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag byrjaðu 29. mars í ár. Sáttmálarnir gingu út 1. mai í ár.

Samráðingarnar gingu væl, hóast neyðugt var at leingja sáttmálan nakrar ferðir fyri at hava neyðugu tíðina at koma til eina semju. Hetta eydnaðist fríggjakvøldið 6. mai, tá semja varð undirskrivað um nýggjar 2-ára sáttmálar.

Tveir sáttmálar fyri pelagisk virksemi vórðu lagdir saman til ein. Samlaða talið av sáttmálum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er sostatt 39.

Umframt tillagingar í sáttmálunum hevur semjan við sær eina lønarhækking á 2,65 kr hin 1. mai 2016 og á 2,60 kr hin 1. mai 2017. Harafturat verður 11-ára starvsaldur settur inn 1. mai 2017.

Hækkingarnar svara til 2,2% fyrra árið og 2,3% seinna árið, sum soleiðis verður karmurin fyri samráðingarrunduna, sum nú er byrjað.

## Samráðingar við Maskinmeistarafelagið

Føroya Arbeiðsgevarafelag skrivaði 31. mai undir nýggjan tvey ára sáttmála við Maskinmeistarafelagið. Talan er um sáttmálan fyri maskinmeistarar í starvi í vinnuni á landi.

Lønarhækkingarnar vóru 2,2% fyrra árið og 2,3% seinna árið, sum er í tráð við karmin.

Sáttmálin er galdandi fra 1. juni 2016 til 1. juni 2018.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir, sum eftir eru at samráðast um í hesi samráðingarrunduni, ganga út sum víst niðanfyri.

Sáttmálasamráðingarnar við YTF um sáttmálan fyri starvsfólk á Elektron eru byrjaðar.

| | |
|---|---|
| 1. juni 2016 | Sáttmálin við YTF um sáttmálan fyri starvsfólk á Elektron |
| 1. oktober 2016 | Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna |
| 1. oktober 2016 | Sáttmálin við Atlantic Workers Union. |
| 1. november 2016 | Sáttmálin við Súluna. |
| 1. januar 2017 | Sáttmálar við Starvsmannafelagið fyri starvsfólk á Føroya Tele og Posta. |
| 1. mars 2017 | Sáttmálarnir við Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Fiskimannafelagið um manningar í handilsflotanum. |
| 1. mai 2017 | Sáttmálin við S & K. |
| 1. mai 2017 | Sáttmálin við Grafiska Yrkisfelagið. |
| 1. mai 2017 | Sáttmálarnir við YTF og Finansforbundet. |
| 1. november 2017 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk. |
| 1. apríl 2018 | Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya |
| 1. mai 2018 | Sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út.<br>Nýggj samráðingarrunda byrjar. |

# Tiltøk 2015-2016

## Vinnunám

**Vinnunám er skeiðstænastan hjá Vinnuhúsinum. Her verður skipað fyri skeiðum og kunningardøgum til limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.**

Endamálið við Vinnunámi er at økja um fakliga førleikan hjá fyritøkum - bæði á leiðslustøði, og eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Vinnunám hevur lagt seg eftir at bjóða limunum skeið og kunningardagar, sum eru beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna á einum ítøkiligum støði.

Hetta seinasta árið hevur verið skipað fyri

- kunningarfundi fyri innflutningsvinnuna um nýggja vøruskrá
- kunningarfundi um design-, patent- og vørumerkjalógina og lógina um brúksmodellir
- kunnandi fundi um Horizon 2020
- kunningartiltaki um uppskot til broytingar í vinnufelagalógini og fylgibroytingar í øðrum lógum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði eisini ein bás á Jobmatch 2015. Hetta er afturvendandi tiltak, sum hevur verið fyriskipa, fyri at geva lesandi í Føroyum og uttanlands høvi at koma í samband við føroyskt vinnulív.

## Heimleiðis tiltøk í Vinnuhúsinum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag skipar javnan fyri heimleiðistiltøkum, sum eru styttri tiltøk um viðkomandi evni.**

Poul Michelsen, landsstýrismaður í Uttanríkis- og Vinnumálum, var og greiddi frá um vinnupolitisku ætlanirnar hjá samgonguni.

Sørin Pram Sørensen, løgfrøðingur í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum, var á einum øðrum heimleiðistiltaki og greiddi frá ætlaðu broytingunum í vinnufelagalógini og fylgibroytingunum í øðrum lógum.

Somuleiðis hevði Føroya Arbeiðsgevarafelag eitt tiltak har kunnað var um broytingarnar í sáttmálunum við arbeiðarafeløgini.

Harafturat hava onnur feløg í Vinnuhúsinum eisini skipað fyri heimleiðistiltøkum.

KT-felagið skipaði fyri tiltakinum "KT er basalt," har fyrisletur var, og har nýggja heimasíðan fyri føroyska KT-vinnu varð víst.

Somuleiðis hevur Oljuvinnufelagið havt eitt tiltak, har felagið kunnaði um ONS2016 og um ætlan teirra at staðseta Føroyar sum maritiman tænastudepil.

## Vinnudagurin 2015

Hetta var 16. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Tað er framvegis týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har føroysk vinna kann vera saman um hetta, sum onkur hevur kallað hátíðardagur vinnunar. Luttøkan var góð, og dagurin væleydnaður.

Á Vinnudegnum vóru sum vanligt Ársins Virki og Ársins Átak kosin.

**Dómsnevndin valdi Bakkafrost til Ársins Virki 2015. Grundgevingin hjá dómsnevndini var henda:**

"Sum vit júst hava hoyrt, hevur dómsnevndin valt Bakkafrost sum Ársins Virki 2015.

Ársins Virki 2015, Bakkafrost, er størsta fyritøkan í føroyskum havbúnaði. Og gongdin í føroyskum havbúnaði sum heild hevur seinastu árini verið sera jalig. Føroyskur laksur hevur síðani 2009 megnað at fingið ein vaksandi meirprís í marknaðinum í mun til norskan aldan laks. Hetta merkir, at føroyskur havbúnaður er serliga dugnaligur til at framleiða og marknaðarføra føroyskan laks á ein hátt, sum kundarnir í best gjaldandi kundabólkunum eru til reiðar at gjalda fyri.

Dómsnevndin hevur í sínari grundgeving fyri at velja Bakkafrost sum Ársins Virki serliga lagt dent á fíggjarligu úrslitini og á tær framskygdu íløgur, sum fyritøkan hevur gjørt. Íløgur, sum fara at minka um váðan í framleiðsluni og gera hana meira effektiva. Bakkafrost hevur latið byggja nýggjan framkomnan brunnbát, sum gevur heilt nýggjar møguleikar. Bakkafrost er eisini í ferð við at byggja eitt nýtt kryvji- og portiónsvirki, sum umframt at savna virksemið hjá 7 verandi virkjum eisini gevur møguleikar fyri virking av nýggjum vørum. Harumframt ger felagið íløgur í smoltstøðir, so til ber at ala størri smolt á landi. Hetta minkar um váðan og gevur møguleika fyri at økja framleiðsluna, uttan at meira fiskur er í sjónum av hesum ávum.

Á umhvørvisøkinum er Bakkafrost fyrsta føroyska alifyritøkan, sum hevur fingið eitt aliøki umhvørvisgóðkent eftir ASC-standardinum. Bakkafrost er eisini farið at reinsa sítt alifóður fyri umhvørvisdálkingarevni, hóast hesi dálkingarevnini frammanundan liggja langt undir almennu markvirðunum. Alt hetta setur eisini Bakkafrost betri í mun til eftirspurningin eftir einum hágóðskuprodukti.

Bakkafrost var fyrsta føroyska fyritøkan, sum varð skrásett á norska virðisbrævamarknaðinum. Um lyklatøl hjá Bakkafrost verða samanborin við aðrar havbúnaðarfyritøkur á Oslo Børs, eru tey ikki verri enn hjá kappingarneytunum, tvørturímóti. Saman við hegni at samskifta við partaeigarar hevur hetta eisini gjørt Bakkafrost-partabrævið til eitt væl dámt partabræv á altjóða virðisbrævamarknaðinum. Í vikuni bórust tíðindi um, at norskir greinarar við Stockman virðislønini valdu Bakkafrost sum bestu miðalstóru fyritøku, tá talan er um kunning um virksemi sítt.

Vit vita tó øll, at tað gongur upp og niður í øllum vinnum. Vit skulu ikki meira enn 10 ár aftur í tíðina, so var føroyskur havbúnaður í svárari kreppu, og hugurin at gera og fíggja íløgur í vinnuna var ikki stórur. Tær íløgur, sum verða gjørdar nú, eru allar við til at minka um váðan, til frama fyri starvsfólk, íleggjarar og alt Føroya land. Vónandi merkir hetta, at tann framburður, sum føroyskur havbúnaður hevur haft, heldur fram í komandi árum, og at sveiggini, sum vit vita fara at koma, verða avmarkaði.

Storm P. segði, at einki kemur av ongum – uttan lummaull. Bakkafrost hevur seinastu árini komið sær í fremstu røð takkað verið dugnaligum starvsfólkum, virkisfýsni og hørðum arbeiði.

Tí fari eg við hesum at ynskja Bakkafrost tillukku við heiðrinum sum Ársins Virki 2015."

**Ársins Átak 2015 var Defined Energy. Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.:**

" Føroyar eru eitt vatnland. Ella soleiðis følist tað í øllum førum fyri okkum, sum liva á hesum klettum, har regn og sirm er ein stórur partur av okkara veruleika. Umframt at tað ofta regnar á okkum, kóka vit okkum ofta vatn til ein drekkamunn, vit drekka vatn afturvið døgurðanum, og onkuntíð mugu vit eftir boðum frá myndugleikunum enntá kóka tað vatn, sum vit drekka afturvið døgurðanum. Vit svimja í vatni, vit baða okkum í vatni dagliga ella fleiri ferðir um vikuna. Vit eru umgyrd av vatni. Jú, Føroyar eru veruliga eitt vatnland.

Føroyar eru eisini eitt endurnýtsluland. Um skóleistarnir vóru hol, vórðu teir stoppaðir aftur, og gjørdist teir ov lítlir, arvaði tann næsti í røðini skóleistarnar, heldur enn at koyra teir vekk. Í roykstovuni var eldurin frá grúgvini ikki bara nýttur til at matgera, men eisini til at hita búfólkini, meðan tey sótu og karðaðu, spunnu og bundu skóleistar. Og tær fáu ferðirnar fólk sluppu í bað, varð baðivatnið brúkt ikki bara einaferð, men fleiri ferðir.

Sum samfelagið og fólk gerast ríkari, er tørvurin á endurnýtslu kanska minkaður, og í dag er tað vanligari at fólk koyra klæðir burtur, tá tey eru hol. Framvegis liggur tað tó nokk so djúpt í føroyinginum, at "hetta er ov gott at koyra burtur", og klæðir verða givin til Blákross, Reyða Kross og aðrar felagsskapir, sum syrgja fyri, at klæðini koma í umfar aftur antin í Føroyum ella aðrastaðni. Men listin yvir tað, sum er "ov gott at koyra burtur", burdi faktiskt verið nógv longri, enn hann er. Tí uttan at hugsa um tað, koyra vit hvønn dag okkurt burtur, sum kundi verðið endurnýtt.

Ársins Átak snýr seg bæði um vatn og um endurnýtslu. Og tað snýr seg um at endurnýta nakað av tí, sum er ov gott at koyra burtur. Áðrenn vit avdúka, hvat Ársins Átak er, er tað kanska vert at dvølja eina løtu við, hvat tað er, sum ger eitt gott átak til Ársins Átak. Tá Ársins Átak verður valt, má nógv orka brúkast uppá at definera, hvat tað er, sum ger hetta átakið meira vert at heiðra enn øll onnur átøk, sum eru í uppskoti. Í summum førum eru tað átøk, sum gera okkum meira effektiv. Í summum førum eru tað átøk, sum verja okkara umhvørvi og veðurlag. Í øðrum førum eru tað átøk, sum spara pengar. Og uppaftur í øðrum førum er tað bara ein genial uppfinning, sum er "born global" frá fyrsta degi.

Men tá man hevur verið allan listan ígjøgnum, kennir man fløvan av at hava valt rætt, tá man ásannar, at júst hetta átakið ger alt tað, sum varð nevnt. Ársins Átak í ár er ein uppfinning, sum ger okkum meira effektiv, sparir pengar, verjir okkara umhvørvi og veðurlag, og so hevur hon møguleika fyri at vera seld um allan heimin, um rætt verður atborðið og neyðuga áræðið og hepnið er til staðar.

Ársins Átak er ein hitavekslari, sum endurnýtir hita úr heita spillivatninum frá brúsunum til at hita tað kalda nýggja vatnið, áðrenn tað rennur inn aftur í ketilin og haðani inn aftur í brúsurnar. Fyritøkan handan hitavekslaran hevur installerað hitavekslaran nøkur støð her á landi, og er eisini á veg út um landoddarnar at selja vøruna. Fyritøkan bjóðar kundunum at keypa ella leiga hitavekslaran, og harvið verður fíggingarspurningurin ikki nakar trupulleiki, um man vil spara pening á hitarokninigini.

Dómsnevndin er samd við hesari fyritøkuni, at avlopshiti er ov gott at koyra burtur, og hevur dómsnevndin tí valt at heiðra fyritøkuna Defined Energy sum Ársins Átak 2015."

# Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

## *Fiski- og flakavinnan*

### Útflutningurin

Samlaða útflutningsvirðið á øllum fiskavørum, íroknað aldan laks, var í 2015 umleið 6,7 mia. kr. í mun til umleið 6,2 mia. kr. í 2014. Útflutningsvirðið á alilaksi er minkað við 150 mió. kr. í sama tíðarskeiði, so tað hevur verið ein vøkstur í útflutningsvirðinum av veiddum fiski á umleið 650 mió. kr. tilsamans.

Samlaða útflutta tonsatalið av fiskavørum øktist við knappum 40.000 tonsum frá 2014 til 2015. Tó eru broytingar í býtinum av útflutninginum millum ymisku fiskasløgini, har mest sjónligu broytingarnar eru ein øking í nøgdini av sild, svartkjafti og øðrum fiskasløgum, meðan útflutningsnøgdin av makreli minkaði.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki úr toski, hýsu og upsa, var fyri fyrstu ferð í fleiri ár nakað hægri samanborið við árið fyri. Tað er tó vert at hava í huga, at væl av botnfiski verður innflutt heilt, síðani virkað og útflutt aftur. Undir brotinum niðanfyri um rávørutilgongd sæst tó, at eisini rávørutilgongdin av hesum fiskasløgum øktist nakað í mun til árið fyri.

Útflutningsvirðið av hesum vørum øktist lutfalsliga heldur meira enn nøgdin, tí miðal útflutningsprísurin var hægri enn árið fyri.

### Rávørutilgongdin

Talvan niðanfyri vísir, at nøgdin í føroysku feskfiskaveiðuni fyri fyrstu ferð í fleiri ár øktist nakað aftur í 2015, hóast árliga veiðan framvegis kann samanberast við veiðuna í ringastu kreppuárunum fyrst í 90'unum. Feskfiskaveiðan var í 2015 góð 70.000 tons, eini 2.000 tons meira enn í 2014, sum tó var tað lægsta í nógv ár.

Serliga tá tað snýr seg um botnfiskasløgini tosk og hýsu, er framvegis ringur standur. Hóast nøgdin av toski hækkaði nakað í 2014, er veiðan framvegis lítil. Nøgdin av hýsu var at kalla óbroytt. Toskur og hýsa eru sum heild stak illa fyri, og fiskiskapurin eftir hesum fiskasløgum er bert ein viðfáningur av, hvat hann var fyri nøkrum árum síðani. Veiðinøgdin av hýsu var í 2003 knøpp 25.000 tons, meðan hon seinnu árini hevur verið um 3-4.000 tons.

Nøgdin av upsa øktist við góðum 1.000 tonsum, men er tó framvegis munandi lægri enn fyri fáum árum síðani, hóast stovnurin skal eitast at vera hampuliga væl fyri. Nøgdin á flatfiski øktist eitt vet, meðan nøgdin av øðrum fiskasløgum øktist við umleið 2.000 tonsum. Avreiðingartølini higartil í ár geva ikki ábending um nakran bata fyri feskfiskaveiðina.

Samlaða avreiðingarvirðið av feskfiskaveiðuni var umleið 814 mió. kr. í 2015 í mun til 677 mió. í 2014, so her er talan um eina øking. Miðal avreiðingarprísurin var sum heild nakað hægri í 2015 í mun til 2014.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2014** | **2015** | **2014** | **2015** | **2014** | **2015** |
| **Toskur** | 10.356 | 12.048 | 148.081 | 207.699 | 14,30 | 17,24 |
| **Hýsa** | 3.220 | 3.624 | 47.963 | 57.065 | 14,90 | 15,75 |
| **Upsi** | 22.109 | 23.212 | 178.477 | 221.878 | 8,07 | 9,56 |
| **Annar botnfiskur** | 10.835 | 9.392 | 115.271 | 99.432 | 10,64 | 10,59 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.194 | 4.523 | 110.001 | 141.215 | 26,23 | 31,22 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 13.082 | 14.973 | 65.383 | 76.917 | 5,00 | 5,14 |
| **Skeljadjór** | 4.449 | 2.990 | 10.981 | 9.314 | 2,47 | 3,12 |
| **Rogn, livur v.m.** | 244 | 173 | 1.076 | 692 | 4,41 | 4,00 |
| **Veiðan tilsamans** | 68.490 | 70.936 | 677.233 | 814.212 | 9,89 | 11,48 |

Kelda: Hagstova Føroya

## Flakavinnan

Sum tað sæst í brotinum omanfyri, vóru nøgdirnar í føroysku feskfiskaveiðini í 2015 á sama støði sum í ringastu kreppuárunum fyrst í 90'unum, hóast ein lítlan bata. Tó at partar av flakavinnuni í eini roynd at bøta um sera avmarkaðu rávørunøgdirnar, hava innflutt frystan fisk úr útlandinum til virkingar, er hetta ein fíggjarliga dýrari loysn. Umframt svikaliga rávørutilgongd er marknaðaratgongdin til aðrar marknaðir verri enn hjá okkara kappingarneytum. Samanumtikið er tí eingin ivi um, at viðurskiftini hjá flakavinnuni framvegis eru avbjóðandi.

Avbjóðandi karmarnir hjá vinnuni síggjast eisini aftur í fíggjarligu úrslitunum hjá flakavinnuni. Ikki allir roknskapir fyri 2015 hjá flakavirkjunum eru tøkir enn, og hugt er tí eftir tølunum fyri 2014. Teir roknskapir, sum eru tøkir fyri 2015, benda tó á, at úrslitini hjá fleiri fiskavirkjum eru heldur lakari í 2015 enn tey vóru í 2014.

Um hugt verður eftir ársúrslitunum í 2014 hjá fyritøkunum undir einum, var tilsamans talan um eitt lítið avlop á umleið 11 mió kr. fyri hesar 15 fyritøkurnar. Hóast tað er ov lítið avlop í mun til tær íløgur sum eru gjørdar, er tað tó tilsamans eitt vet frægari úrslit enn í 2013.

Á myndini niðanfyri sæst ársúrslitið uttan kapitalpartar hjá 15 fyritøkum sum virka botnfisk.

**Úrslit hjá 15 fyritøkum í fiskiídnaðinum í 2014**




Kelda: www.vinnuvitan.biz

# Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu

## Útlit fyri fiskiskapin komandi fiskiár

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2015/2016 skrivar Havstovan, at upsastovnurin er hampiliga væl fyri, meðan støðan í hýsu- og toskastovnunum er sera ring. Tilgongdin av toski og hýsu hevur í nýggjari tíð ongantíð svikið so nógv ár á rað og eingi útlit eru til bata komandi árið. Vit eru í longsta tíðarskeiði við fiskaloysi, ið hagtøl eru tøk fyri (síðani fyrst í 1900-talinum fyri Landgrunnin og 1965 fyri Føroyabanka). Havstovan mælir til at seta álvarslig tiltøk í verk.

Um toskin á landgrunninum skrivar Havstovan, at gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2004. Stovnurin í 2014 verður mettur at vera umleið 21.000 tons, sum er minsta mark fyri, hvat er ráðiligt. Langtíðarmálið er, at stovnurin í minsta lagi skal vera 40.000 tons. Tilgongdin av 2 ára gomlum toski hevur líka síðani 2001 -verið undir miðal, og í 2011-2014 er hon mett at vera sera lítil. Sostatt er eingin ivi um, at toskastovnurin á landgrunninum framvegis er illa fyri.

Havstovan skrivar eisini, at toskurin á Føroyabanka framvegis er illa fyri, og mælir Havstovan framvegis til, at eingin toskafiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka.

Hýsustovnurin er eisini heilt illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hýsustovnurin hevur síðani 2010 verið undir markinum fyri, hvat er lívfrøðiliga ráðiligt. ICES mælir aftir í ár til onga beinleiðis veiði eftir hýsu, og at hjáveiðan verður avmarkað mest møguligt.

Upsa-gýtingarstovnurin er hampuliga væl fyri, og er framvegis omanfyri minstamarkið fyri, hvat er ráðiligt. Veiðutrýstið hevur hesi seinastu árini verið í hægra lagi, men kom í fjør niður ímóti langtíðarmálinum.

Samanfatandi mælir Havstovan til at draga inn allar fiskidagar, sum í fiskiárinum 2013/14 vóru óbrúktir. Orsøkin er, at so skjótt, sum stovnarnir eru komnir eitt sindur fyri seg, kann væntast at hesir dagar verða aktiveraðir, og so kann tað forða einari menning av stovninum. Harumframt mælir Havstovan til at skerja dagatalið hjá bólkunum, sum serliga veiða tosk og hýsu (t.e. bólk 3, 4 og 5) við 50% av teimum brúktu døgunum. Eisini mælir Havstovan til at brúka aðrar reguleringar fyri at geva smáfiski av serliga toski og hýsu betri møguleikar at vaksa seg inn í fiskiskapin.

Viðvíkjandi upsanum mælir Havstovan til, at dagatalið hjá bólki 2, sum serliga fiskar upsa, verður tað sama sum brúkta dagatalið í fiskiárinum 2013/14. Eisini mælir Havstovan til krav um rist í upsatrolum fyri at verja tann smáa upsan.

Samanumtikið mugu vit ásanna, at útlitini fyri fiskiskapin eftir vanligu botnfiskasløgunum eru sera ring, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðinøgdin av botnfiski undir Føroyum verður á sama lága støði, sum hon hevur verið árini frammanundan.

## Marknaðurin

Í mun til havbúnaðin og uppisjóvarvinnuna hava útflytarar av botnfiskavørum í størri mun dúvað uppá siðbundna ES-marknaðin. Seinastu árini hava vit tó sæð eina gongd, har tað spakuliga vera útfluttar meira botnfiskavørur til lond uttanfyri ES. Frá at hava útflutt uml. 8% av botnfiskavørum til ES í 2011 er hesin parturin øktur ár um ár, og í 2015 vóru umleið 17% av virðinum av botnfiskinum útflutt til lond uttanfyri ES. ES er tó framvegis nógv tann mest týðandi marknaðurin fyri føroyskan botnfisk.

Keypiorkan á siðbunda ES-marknaðinum er tó framvegis lág, hóast hon batnaði nakað í mun til árið fyri. Støðan á marknaðinum kann broytast skjótt, og t.d. eru dømi um, at tá keypiorkan svíkur í londum uttanfyri Europa, eru fiskaseljarar skjótir at skifta til aðrar marknaðir, og tað kann skjótt viðføra, at kappingin harðnar á evropeiska marknaðinum. Tá keypiorkan á ES-marknaðinum er avmarkað, hevur tað serliga stóran týdning, at aðrir marknaðir eru opnir fyri føroyskum fiskavørum. Góð marknaðaratgongd er ein fortreyt, um vit vilja tryggja, at vit fáa besta prís og mest virði fyri útflutta fiskin og harvið eisini tryggja arbeiðspláss í Føroyum.

Hóast ein glotti í farna ári hevur verið við nýggju fríhandilsavtaluni millum Føroyar og Turkaland, hava føroysku fiskaútflytarar framvegis munandi verri marknaðaratgongd uttanfyri ES enn okkara størstu kappingarneytar. Hetta er eitt mál, sum má raðfestast frammarlaga av føroyskum myndugleikum í komandi árum. Sí eisini eitt longri brot um henda spurning omanfyri í ársfrágreiðingini.

# Havbúnaður

## Framleiðsla

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í 2015 góð 66.000 tons í kruvdari vekt. Í rundari vekt svarar hetta til eina tøku á góð 80.000 tons.

Framleiðslan í 2015 var sostatt nakað lægri enn í 2014, tá havbúnaðurin framleiddi góð 70.000 tons í kruvdari vekt. Minkingin var uml. 7%, og er serliga orsakað av tíðarbundnu sveiggjunum í tøkuni. Í 2016 væntast framleiðslan av laksi frá føroyskum havbúnaði væntandi at hækka upp aftur á sama støði sum í 2014.

Lívfrøðiligu karmarnir kring alivinnuna eru sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori, sjúkustøðu og framleiðslukostnaði. Fellið er eisini á einum lágum støði, men hevur tó verið hækkandi seinastu árini. Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur ein høgur laksaprísur eisini havt við sær, at feløgini hava havt góð fíggjarlig úrslit í 2015. Góðu fíggjarligu úrslitini hava eisini haft við sær, at havbúnaðurin hevur møguleika at gera íløgur í framleiðslutólini. M.a. eru og verða íløgur gjørdar í útbygging av smoltstøðunum, nýggjum brunnbátar og útgerð til ikki-medisinska viðgerð móti laksalús. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan oggeva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt.

Í 2015 vórðu umleið 15,9 mió. smolt sett út í Føroyum. Hetta er nakað meira enn í 2014, tá umleið 14,7 mió. smolt vórðu sett út.

**Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2001 - 2015 (1.000 tons)**




| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 3,126 | 11,149 | 10,220 | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 46,014 | 44,953 | 52,526 | 40,985 | 18,962 | 13,083 | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 | 80,629 |

Kelda: Hagstova Føroya

## Lívfrøðiligir váðar

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur trupulleikin framvegis at verða tikin í størsta álvara. Fyri at minka um tørvin á medisinskari viðgerð, eru feløgini farin undir at nýta m.a. rognkelsi, feskvatnsviðgerð, lúsaspularar og termolúsarar til at halda lúsatalinum niðri.

Í 2014 vórðu tey fyrstu rognkelsini sett út í føroyskar aliringar, og síðan tá eru fleiri royndir við rognkelsum gjørdar. Royndirnar higartil hava verið góðar, og eingin ivi tykist vera um, at rognkelsini kunnu vera við til at halda lúsatalinum niðri.

## Skattur og avgjøld

Á heysti 2015 var enn ein nýggj skipan fyri loyvisskatt fyri alifyritøkur sett í verk. Skipanin legði eitt tøkugjald á alivinnuna, ið er 4,5% av einum roknaðum søluvirði. Seinastu árini er avgjaldsskipanin broytt á hvørjum ári og ofta við sera stuttum skotbrá. Hetta stimbrar ikki íløguhugin í alivinnuni.

Umframt eina broyting í útrokningarháttinum er talan um munandi hækking í mun til tað avgjald, sum var galdandi áðrenn.

Við nýggju skipanini er veruligur vandi fyri, at alifyritøkur noyðast at gjalda henda serskatt, hóast virksemið skuldi givið undirskot. Í dag er forðingin fyri vøkstri í heimsframleiðsluni serliga trupulleikarnir við laksalús, og er tað tí serliga laksalúsin sum heldur prísinum uppi. Tá trupulleikin við laksalúsini verður loystur, og heimsframleiðslan fer at vaksa aftur, mugu vit vænta at vinningurin fer niður aftur á tað støðið, sum hann var, áðrenn trupulleikarnir við laksalúsini tóku seg upp. Tá verður trupult yvirhøvur at hava nakað yvirskot at reinvestera í fyritøkuna, um verandi avgjaldsskipan verður varðveitt.

**Útflutningsvirðið frá føroyskum havbúnaði 2003-2014 (1000 kr.)**




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SÍL | 159.912 | 77.366 | 58.674 | 98.859 | 100.773 | 138.618 | 175.082 | 69.954 | 8.724 | 195 | 2.585 | 273 | 152 |
| LAKSUR | 804.623 | 684.992 | 439.852 | 374.320 | 492.661 | 824.419 | 1.203.59 | 1.338.08 | 1.618.39 | 1.822.51 | 2.456.40 | 2.950.53 | 2.799.12 |

Kelda: Hagstova Føroya

## Søla og marknaðarútlit

Søluvirðið frá føroyskum havbúnaði minkaði eitt sindur úr 2,9 mia. kr. í 2014 niður á 2,8 mia. kr. í 2015, men framvegis stendur føroyskur havbúnaður fyri knappari helvt av samlaða føroyska vøruútflutninginum. Í talvuni omanfyri sæst gongdin í útflutninginum frá føroyskum havbúnaði.

Føroyska alivinnan marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin sum føroyskur laksur fær á marknaðinum er eisini hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Seinastu árini er alsamt størri parturin av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, eitt nú Russland, USA og Kina. Í 2006 varð 83% av laksinum útfluttur til ES, í 2011 var hetta minkað til 58%, og í 2015 fór 30% av útflutningsvirðinum á laksi til ES. Í nøgd er talan um uppaftur minni nøgdir, sum fara til ES. Tað er eisini serliga uttanfyri Evropa, at vøksturin í søluni er eyðsýndur í hesum tíðum.

Heimsframleiðslan av laksi øktist við uml. 3% í 2015, men hóast hetta kvinkaði prísurin upp eftir. Globala framleiðslan av laksi minkar væntandi uml. 6% í ár. Marknaðarútlitini eru tískil góð uppá stutt sikt, og hevur prísurin á laksi higartil í 2016 verið óvanliga góður. Meira ivasamt er tó, hvørja ávirkan høgi laksaprísurin fer at fáa á eftirspurningin uppá longri sikt. Laksaprísurin hevur søguliga sæð sveiggjað nógv, og tí kunnu koma tíðarskeið, tá tað kann gerast torført at vinna pening á marknaðinum.

# *Handverksvinnan*

## Gongdin í byggivinnuni

### Innflutningurin av byggitilfari

Myndin niðanfyri vísir innflutningin av tilfari og lutum til byggivinnuna seinastu 10 árini. Eftir at innflutningurin av byggitilfari vaks munandi í 2013 og 2014 við ávíkavist 19,6% og 17,3%, er vøksturin minkaður niður á 3,2% í 2015.




Kelda: Hagstova Føroya

### Talið á nýbyggingum

Ein fullfíggjað sethúsa- ella bygningsskráseting er ikki til, men verða skrásetingarnar hjá SEV, viðvíkjandi gjøldum fyri (ný)íbindingar í elkervið nýttar, sæst at hesin bólkurin av bygging minkar alsamt.

Talið á nýbygdum sethúsum minkaði úr 197 í 2009 til 54 í 2014, men vaks aftur í 2015 til 70.




Nýíbindingar í elkervið, skift á sethús, raðhús og íbúðir. Kelda: Hagstova Føroya

Talið á nýbyggingum í 2014 gjørdist tað lægsta higartil í hesari øldini, og fimta árið á rað var ein minking í talinum á nýbygdum sethúsum. Hetta talið er tó vaksið nakað aftur í 2015.

Verður bygging sundurgreinað í økir sæst, at tað framvegis er í Streymoyarøkinum, at flestu búðstaðirnar verða bygdir.

| | 2014 | | | | 2015 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sýsla | Sethús | Raðhús | íbúðir | Tilsamans | Sethús | Raðhús | íbúðir | Tilsamans |
| Norðoya | 4 | 0 | 2 | 6 | 5 | 0 | 10 | 15 |
| Eysturoyar | 16 | 0 | 5 | 21 | 13 | 1 | 0 | 14 |
| Streymoyar | 27 | 3 | 2 | 32 | 36 | 5 | 4 | 45 |
| Vága | 3 | 0 | 4 | 7 | 10 | 0 | 1 | 11 |
| Sandoyar | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Suðuroyar | 2 | 0 | 1 | 3 | 6 | 0 | 6 | 12 |
| | | | | | | | | |
| **Allar Føroyar** | **54** | **3** | **14** | **71** | **70** | **6** | **21** | **97** |

Bygging greinað í øki. Kelda: Hagstova Føroya

Tað er tó merkisvert, at meðan talið av nýbygdum sethúsum í Eysturoynni nærum tvífaldaðist, so minkaði talið við tveimum triðingum í Streymoynni. Samstundis tvífaldaðist bólkurin “Annað” í Streymoyarøkinum.

Vøksturin í 2014 er sostatt at finna í øðrum enn sethúsabygging. Tað er at fegnast um, at bæði privat og almenn bygging veksur, og at støðan í byggivinnuni tí batnar. Ein fortreyt fyri, at økta virksemið heldur fram, er tó, at tað verða føroyskar fyritøkur, sum vinna komandi útbjóðingarnar.

## Útlit fyri handverksvinnuna

Sum heild eru útlitini hjá byggivinnuni fyri 2016 betri enn í árunum frammanundan, har tað hjá nógvum fyritøkum mest snúði seg um at koma gjøgnum kreppuna, til tíðirnar gjørdist betri.

Tað kann gerast ein avbjóðing at finna faklærda arbeiðsmegi í Føroyum til allar hesar verkætlanir, tí tað framhaldandi er eitt stórt tal av handverkarum, sum hava leitað sær arbeiði í Noregi og aðrastaðni, meðan virksemið í byggivinnuni í Føroyum var so lítið. Tað er tó ein bati, at Løgtingið hevur samtykt at lætta um atgongdina at fáa handverkarar úr ES til Føroya at arbeiða um arbeiðsloysið er undir 6%. Í teirri løtu, at arbeiðsloysið í 3 fylgjandi mánaðir hevur verið omanfyri 3,5% eru tað tó bara fyritøkur í byggivinnuni, sum kunnu fáa ES-arbeiðsmegi inn eftir nýggju reglunum. Hetta merkir at t.d. maskinverkstøð, bilverkstøð, kokkar til matstovur og onnur, sum ikki arbeiða innan byggivinnuna, kunnu hava torført við at fáa mannað ósett størv.

Hetta er ein skeivleiki, sum eigur at vera rættaður.

Avbjóðingar eru eisini fyri framman viðvíkjandi útbjóðing av byggiverkætlanum.

Í dag útinnir Landsverk entreprenørvirksemi á fleiri økjum, so sum viðlíkahald av landsvegum og tunlum, fresing og asfaltering, vetrarhald á landsvegunum, umframt framleiðlu og sølu av gróti, skervi og asfalti.

Hetta er ein stórur marknaðarpartur, Landsverk situr á, sum eigur at blíva útveittur. Vinnan hevur ta greiðu fatan, at jú meira av entreprenørvirksemi Landsverks verður útveitt, jú fleiri fyritøkur hava møguleikan at sleppa framat. Hetta eggjar eisini til at nýggjar fyritøkur kunnu spíra. Hetta er gott fyri kappingina og samstundis fyri kostnaðarstøðið á tí arbeiði, sum Landsverk bjóðar út. Soleiðis eigur Landsverk at keypa vørur og tænastur frá vinnuni, heldur enn at átaka sær entreprenør uppgávur.

## *Shippingvinnan*

Talið av skipum í FAS liggur nú meiri støðugt um tey 90 skipini. Tað sær tí út til, at henda vinnugreinin verður verandi ein týðandi partur av føroysku vinnulívsmyndini, og sama ger seg galdandi, tá tað kemur til týdningin fyri føroyska samfelagið.

**Lønarinntøkur undir FAS (1.000 kr)**




Kelda: TAKS

Hetta sæst eisini á grafinum omanfyri, har tað er týðiligt, at lønirnar, sum eru útgoldnar undir FAS, støðugt hækka. Lønarinntøkurnar eru meira enn tvífaldaðar hesi árini síðan 2010, og gevur shipping og FAS skipanin sostatt eitt munandi ískoyti til peningarenslið inn til Føroya.

Tað er ymiskt, hvussu árið hevur hilnast í vinnuni. Offshore er sum heild í svárari kreppu og hevur stórar avbjóðingar fyri framman vegna kollaps í oljuprísum og minkandi leitivirksemi. Harumframt ávirka støðan í Russlandi og stórar muturgølur í Brasilia marknaðin neiliga. Kreppan væntast at verða long.

Fyri aðrar partar í vinnuni gongur betur. Tangaskipsmarknaðurin hevur havt eina positiva gongd í seinastuni, og lækkandi oljuprísir hava eisini havt eina jaliga ávirkan á partar í vinnuni.

Kappingin er sum altíð hørð, tí reiðaríini virka á altjóða marknaðinum. Tí er tað umráðandi fyri vinnugreinina framhaldandi at hava støðugar karmar og at vera kappingarfør í mun til reiðaríir undir øðrum flaggi. Umframt at vinnan sjálvsagt javnt tillagar seg til umstøðurnar, so hevur tað, sum nevnt er í fleiri ársfrágreiðingum undan hesari, týdning, at føroysk lóggáva, reglur og umsiting ikki leggja óneyðugar fótonglar fyri vinnuna. Tað eru millum annað viðurskifti í sambandi við FAS, sum eiga at verða dagførd, soleiðis at føroysk skip kunnu kappast á jøvnum føti við onnur.

At Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur sett ein bólk at gera uppskot til yvirskipaða maritima strategi er tí at fegnast um.

Reiðarafelagið fyri Farmaskip gjørdi í fjør eina kanning millum limir sínar, sum hevði til endamáls at útgreina ávís viðurskifti í vinnugreinini. Kanningin fevnir sostatt um meginpartin av vinnugreinini.

Út frá kanningini ber m.a. til at staðfesta, at umsetningurin í vinnugreinini tilsamans er millum 1,5 og 2 mia. kr. Hetta stuðlar undir tað, sum sagt verður longri frammi, at talan er um eina stóra og týðandi vinnugrein í Føroyum. Eisini vísir kanningin ítøkiliga, at vinnan leggur nógv eftir seg á landi við m.a. tryggingum og umsiting av feløgunum. Bara í umsitingini hjá reiðaríunum starvast yvir 100 fólk.

Ískoytið til føroyska samfelagið sæst ikki bert aftur í mun til krónur og oyrur, men eisini tá tað kemur til samfelagsligar skyldur. Millum annað við at gera tað møguligt hjá komandi føroyskum yvirmonnum at nema sær neyðugu praktisku førleikarnar til sjós.

Gongd er nú komin á tiltrongdu aspirantskipanina. Fyrstu navigatør-aspirantarnir eru nú undir útbúgving á Vinnuháskúlanum. Enn er ov tíðliga at siga, hvussu skipanin fer at roynast, men tað sær út til, at hon fer at eydnast væl.

Tað er at fegnast um, at vinnugreinin nú sær út til at hava fingið grundfesti í føroyska vinnuliga landslagnum, og hetta kann verða við til at tryggja, at hon eisini framhaldandi verður tað. Maritima strategiin, sum er nevnd omanfyri, kann tryggja grundfesti enn meira, um rætt verður farið fram.

Umframt øktar inntøkur hjá sjófólki, so hevur vinnugreinin við sær munandi størri virksemi á landi. Beinleiðis virksemi á landi er umsitingin hjá reiðaríunum. Avleidda virksemi er fjølbroytt, men her kunnu eitt nú verða nevnd reiðarívirksemi, skeiðsvirksemi umframt trygging og fígging av virksemi og skipum hjá limunum. Vinnugreinin hevur tó stórar avbjóðingar í komandi tíðum. Ávís viðurskifti eru, sum ganga rætta leið, men tað er neyðugt alla tíðina at halda sær fyri eyga, at reglur, mannagongdir og lóggáva í Føroyum ikki virkar kappingaravmarkandi fyri føroysk reiðarí.

## Oljuvinnan

Leitivirksemi hevur verið á føroyska landgrunninum í eini 15 ár, og níggju brunnar eru boraðir, tó uttan lønandi oljufund. Jarðfeingi hevur ta áskoðan, at fleiri øki eiga at verða kannað, og at góðir møguleikar eru at finna olju í rakstrarverdum nøgdum. Lágur oljuprísur merkir, at verandi løta ikki er tann rætta at bjóða leitiloyvi út. Landstýrismaðurin hevur boðað frá, at í 2017 verður aftur møguligt hjá oljufeløgum at fáa nýggj loyvir til at leita eftir olju undir Føroyum, og at hesi verða boðin út eftir open-door skipanini. Myndugleikarnir fyrireika í løtuni tilfar til útbjóðingarrunduna í 2017.

Fyritaksemið innan frálandavinnu í Føroyum er komið á eitt vegamót, nú ongin nýggj leitiboring er fráboðað. Tað tykist, sum oljuvinnan er farin frá at upparbeiða eina oljuframleiðslu í Føroyum til heldur at veita tænastur til oljuvinnuna. Hetta kom millum annað til sjóndar á messuluttøkuni á Offshore Europe 2015 í Aberdeen, har føroyski landabásurin marknaðarførdi Føroyar, og tær maritimu førleikar og tænastur, sum vit kunnu veita.

Oljuvinnufelagið er samstundis farið undir eitt átak, hvørs endamál er at staðseta Føroyar sum eina maritima tænastudepil fyri frálandavinnuna og alla ta skipaferðslu, sum siglur framvið Føroyum. Umvegis tær níggju boringarnar í Føroyum og vitjanina hjá West Hercules er prógvað, at tænastuvinnan herheima er væl og virðiliga kappingarfør á altjóða stigi.

## KT-vinnan

KT-vinnupolitikkurin hjá landinum var einmælt samtyktur og útgivin av Føroya Løgtingi í 2002, og hann hevur leingi havt tørv á dagføring. KT-vinnan hevur tikið stig til at dagføra politikkin saman við undanfarna landsstýrið, men áðrenn tað eydnaðist at koma á mál, varð nýval útskrivað. Samgongan hevur sett strategi fyri KT-vinnu í samgonguskjalið, so tað fegnast KT-vinnan um.

KT-felagið arbeiðir miðvíst við at seta føroyska KT-vinnuni á skrá í samfelagskjakinum, ásannandi at føroyska KT-vinnan er munandi minni í vavi, um samanborið verður við grannalondini. Trý átøk eru sett á skrá fyri at bøta um hetta. Hesi eru útbúgving av KT-fólkum í Føroyum, raðfesting av íløgum í KT-loysnir, og at føroyska KT-vinnan fer frá at vera undirveitari til at vera høvuðsveitara, við tí fyri eyga at fáa menning og rakstur av KT-skipanum í Føroyum.

Undanfarna samgonga setti talgilding á skrá. Og í januar 2015 kom umbøn frá Gjaldstovuni vegna Vinnumálaráðið um at velja umboð í stýrisbólkin fyri verkætlanina Talgilding Landsins (seinni umdoypt til Talgildu Føroyar), sum var í ferð við at verða sett í gongd. Føroya Arbeiðsgevarafelag valdi táverandi formannin í KT-felagnum Ólavur Ellefsen at umboða vinnuna í hesum arbeiðnum.

Í høvuðsheitum gongur ætlanin út uppá,

- at bjóða føroyingum ein talgildan samleika, sum kann nýtast í øllum samskifti við tað almenna,
- at standardisera alt samskifti millum stovnar (umvegis Heldina),
- at rudda upp í týdningarmestu grundskráunum, serliga persóns- og virkisdáta, soleiðis at stovnar og virkir ikki nýtast at viðlíkahalda teirra egnu grundskráir
- at gera tað einfaldari og betri hjá borgarum og virkjum at avgreiða teirra viðurskifti við tað almenna umvegis portalar og aðrar líknandi loysnir

Nú verður arbeitt við at íverkseta teir fýra partarnar av verkætlanini.

Niðurstøðan er, at fyribils eru settu málini nádd. Løgtingið er sera positivt um at játta neyðuga peningin til verkætlanina, føroyskir KT-førleikar eru gagnnýttir, og alt týðir uppá, at loysnirnar frameftir fara at vera mentar í Føroyum.

## Samskiftisvinnan

Samskiftis- og lýsingarvinnan merkti stórliga árinið av fríggjarkreppuni, men seinastu árini hevur tó verið meiria støðugt virksemi í vinnuni.

Tað eru tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við einum støðugum talið av smærri veitarum - í fleiri førum einstaklingavirkir.

Vegna vantandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein ítøkiligan vøkstur ella fall í vinnugreinini, men afturmeldingar frá vinnuni eru, at talan er um ein størri eftirspurningur í 2015 samanborið við undanfarnu árini.

## Ráðgevaravinnan

Nógv virksemi er í byggivinnuni og merkist tað í ráðgevaravinnuni. Talið av ráðgevaravirkjum og starvsfólkum í vinnuni í Føroyum er vaksandi og ber hetta boð um vaksandi eftirspurning eftir ráðgevaratænastum.

Føroyska ráðgevaravinnan hevur drúgvar royndir og breiða vitan um øll sløg av arbeiðum, sum tørvur er á at fáa gjørt í Føroyum. Ráðgevaravinnan strembar eftir, at hetta eisini í framtíðini verður so, tí fyrimunirnir eru nógvir. Í fyrsta lagi verða vitanarstørv varðveitt í landinum, og í øðrum lagi er ráðgevingin smidligari, tá hon verður veitt í nærumhvørvinum. Í triðja lagi eru føroysku tímatakstirnir lægri enn í grannalondunum. Harafturat kemur, at føroyska samfelagið hevur stórt gagn av, at vitanin um at byggja bygningar og aðra nýgerð eftir føroyskum fortreytum verður varðveitt og ment her á landi.

Ráðgevarafelagið arbeiðir áhaldandi við at ávirka soleiðis, at føroyskar ráðgevarafyritøkur fáa javnbjóðis atgongd til allar føroyskar verkætlanir. Arbeitt verður eisini fyri at fáa gjøgnumskygni í sambandi við tilluting og døming av útboðum. Smáir batar hava verið at sæð, men enn manglar nakað, áðrenn støðan er nøktandi.

Gleðiligt er, at Løgtingið hevur samtykt broyting í útbjóðingarlógini, og at har er krav sett um, at útbjóðingartilfar skal vera á føroyskum máli.

## Handilsvinnan

Innflutningurin til handilsvinnuna er vaksin í 2015 í mun til 2014. Samlað sæð er innflutningurin til handilsvinnuna vaksin rættiliga støðugt seinastu árini.

Gongdin á samlaða innflutninginum til Føroya sæst niðanfyri.

| Innflutningur, (1.000 kr.) | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Allur innflutningur | 5.278.862 | 6.682.948 | 6.273.100 | 6.019.665 | 6.095.038 | 75.373 | 1,25% |

Kelda: Hagstova Føroya

## Ódrúgvar vørur

Sum tað sæst á talvuni niðanfyri, hevur innflutningurin av matvørum verið støðugt vaksandi síðani 2011. Vøksturin á mati, drykkivørum og tubakki er tó minkaður í mun til vøksturin í 2014, sum tá var 7,1%. Matvørulógin var fyri stuttum liberaliserað, soleiðis at heimaframleiðsla, tað vil siga føroysk framleidd vøra, sum ikki er løggild, kann seljast í handlunum. Um hetta átak ber vøkstur við sær, verður tað ikki at síggja í tølunum niðanfyri, av tí at talan her bert er um innfluddar vørur. Talan verður tó um størri vøruúrval í handlunum og harvið betri tænastu til kundan.

| Ódrúgvar nýtsluvørur, (1.000 kr.) | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Matur, drykkjuvørur og tubbak | 526.927 | 547.173 | 559.179 | 598.704 | 616.508 | 17.804 | 2,97% |
| Aðrar ódrúgvar nýtsluvørur | 133.922 | 131.110 | 135.072 | 142.187 | 144.956 | 2.769 | 1,95% |

Kelda:Hagstova Føroya

Drúgvar og hálvdrúgvar vørur
Innflutningurin av hálvdrúgvum nýtsluvørum er sum heild vaksin í mun til 2014.

| Hálvdrúgvar nýtsluvørur, (1.000 kr.) | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Klæðnavørur | 120.115 | 124.062 | 133.784 | 133.066 | 139.113 | 6.047 | 4,54% |
| Fótbúnaður | 25.211 | 26.897 | 27.757 | 29.493 | 31.505 | 2.012 | 6,82% |
| Aðrar hálvdrúgvar nýtsluvørur | 166.775 | 169.164 | 183.265 | 199.394 | 211.163 | 11.769 | 5,90% |

Kelda: Hagstova Føroya

Innflutningurin av drúgvum nýtsluvørum er týðiliga vaksin. Vøksturin á innflutninginum av persónbilum var í 2015 25,6% samanborið við 10,7% í 2014.

| Drúgvar nýtsluvørur (1.000 kr.) | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuakfør | 52.105 | 54.304 | 80.795 | 87.583 | 106.346 | 18.763 | 21,42% |
| Persónbilar | 106.520 | 158.707 | 198.052 | 219.242 | 275.404 | 56.162 | 25,62% |
| Onnur akfør, húsvognar & smábátar | 9.228 | 14.272 | 13.400 | 14.692 | 20.093 | 5.402 | 36,77% |
| Aðrar drúgvar nýtsluvørur | 151.951 | 151.207 | 163.016 | 169.059 | 175.113 | 6.054 | 3,58% |

Kelda: Hagstova Føroya

Innflutningstølini vísa, at innflutningurin er vaksin væl meira frá 2014 til 2015 enn undanfarin ár.

Hetta ber boð um ein øktan eftirspurning í 2015 í mun til undanfarin ár.

Sum avleiðing av fíggjarkreppuni tálmaðu fyritøkur í handilsvinnuni rakstrarútreiðslurnar á øllum økjum. Serliga varð skorið niður í marknaðarføringsútreiðslunum, men eisini lønarútreiðslurnar minkaðu hetta tíðarskeiðið. Sambært fyritøkunum er marknaðurin ikki so óstøðugur, sum hann var í tíðarskeiðinum 2008 - 2010, men kappingin í vinnuni hevur gjørt, at aktørarnir eru færri, og eindirnar størri. Hetta hevur rationaliserað raksturin millum annað við tað, at fleiri handlar virka undir somu umsiting.

## Søla av bilum

Sølan av bilum gevur vanliga eina ábending um, hvussu búskapurin hevur tað, og um vanligi brúkarin hevur álit á framtíðina.

Tað er líkt til, at støðan er vorðin betri seinastu árini. Sølan av nýggjum bilum í 2015 er vaksin við 15,13% í mun til 2014. Sølan er nú farin væl upp um støðið í 2008, tá ið 1.948 nýggj akfør vórðu seld.

| Nýggj akfør seld | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stk. | 1218 | 1527 | 1852 | 2201 | 2534 | 333 | 15,13% |

Kelda: Akstovan

## *Ferðavinnan*

Í ferðavinnuni var 2015 merkt av sólarmyrkingini, sum var 20. mars 2015, og tað er at fegnast um, at føroyska ferðavinnan megnaði uppgávuna, og at tað gekk sjón fyri søgn, at tað er møguligt at skipa fyri hendingum og tiltøkum av hesi støðd í Føroyum. Henda stórhending tykist eisini at givið góð úrslit fyri vinnuna. Støðan í ferðavinnuni sær sostatt positiv út í løtuni, og vónin er, at góða gongdin fer at halda fram í 2016.

Talið á gistingum er vaksið, og umsetningurin í vinnuni er á eini góðari leið. Hotellini hava havt tørv á at byggja út, og nýggj hotell eru stovnað seinastu árini.




Kelda: Hagstova Føroya

Sambært tølunum hjá Hagstovuni eru gistingarnæturnar øktar við 13% í 2015. Í myndlinum niðanfyri sæst, hvussu býtið er millum tey londini, haðani vit fáa flest ferðafólk. Millum hesi londini er størstur vøkstur í bretsku og íslendsku gistingunum. Ein partur av økingini í íslendsku gistingunum stavar allarhelst frá, at Vestnorden Travel Mart var hildið í Føroyum í ár.




Kelda: Hagstova Føroya

Tað tykist eisini sum brúksmynstrið hjá føroyingum er í broyting. Føroyingar sjálvir eiga ein stóran part av lagkøkuni omanfyri, og er hetta ein vøkstur á 25% samanborið við 2014. Vit síggja eisini ein stóran vøkstur í ferðafólkaflutninginum til Føroya. Her er talan um bæði føroyingar og útlendingar.




Kelda: Vága Floghavn og Smyril Line

Um vit hyggja at gistingum á gistingarhúsum, sæst at slakastu mánaðirnir eru januar, februar og desember, og at gongdin í 2015 fylgir gongdini í 2014. Háárstíðin í ferðavinnuni er víðkað til eisini at fevna um mai og september.

## Gistingar á gistingarhúsum




Kelda: Hagstova Føroya

Hagstova Føroya hevur eftir umbøn frá Visit Faroe Islands kannað búskaparliga týdningin av føroysku ferðavinnuni. Sambært hesum tølum, sum tó enn bert eru tøk til og við 2014, var umsetningurin til útlendsk ferðandi 572 mió kr. Hóast ivamál er um tølini av ársverkum, verða tey mett at verða 372 í 2014, men tá eru bert flutningsfeløg, ferðaskrivstovur, gistingar og hotellvirksemið tikin við. Matstovur, upplivingarveitarar og ferðaleiðarar eru ikki rokna uppí.

## *Uppisjóvarvinnan*

Seinastu árini hevur gondin í uppisjóvarvinnuni sum heild verið góð. Útflutningsvirðið er hækkað á hvørjum ári síðan 2009, tó undantikið 2014. Í talvuni sæst gongdin í útflutningsvirðinum av mest vanligu uppisjóvarfiskasløgunum.




Kelda: Hagstova Føroya

Útflutningurin av uppisjóvarfiski hevur verið eyðkendur av stórum broytingum og sveiggjum, serliga í mun til útflutningsmarknaðirnar. Í 2007 fór niðanfyri 20 % av útflutningsvirðinum av mest vanligu uppisjóvarfiskasløgunum til ES-marknaðin. Hetta øktist til umleið til umleið 50 % í 2012, men er nú minkað niður aftur í 27 %. Tað er serliga økti útflutningurin til Russlands, sum hevur elvt til hesa minking.

Handilstiltøkini hjá ES eru sett úr gildi aftur, og støðan á russiska marknaðinum er í løtuni góð. Hinvegin er marknaðaratgongdin til Nigeria vorðin verri, m.a. orsakað av nýggjum valutaavmarkingum. Slíkar broytingar eru ein viðvirkandi orsøk til broytingarnar á útflutningsmarknaðunum.

Handilstiltøkini hjá ES vóru eisini viðvirkandi til broytingar í framleiðsluni. Nýggj uppisjóvarvirki eru bygd her á landi, og framleiðsluorkan er harvið munandi økt. Ætlanir hava verið um at meirvirka uppisjóvarfisk (m.a. makrel í dós), men tollforðingar fyri niðursjóvaðar vørur til ES-marknaðinum hava fyribils forðað fyri, at ætlanirnar eru vorðnar veruleiki. Tó eru nú eisini ætlanir um nýtt surimivirki í Suðuroy.

## *Ídnaðarvinnan*

Føroyska ídnaðarframleiðsluvinnan hevur í mong ár verið undir stórum kappingarligum trýsti frá líknandi vørum frá øðrum marknaðum. Hetta hevur merkt, at talið á fyritøkum innan ídnaðarframleiðslu er fallið munandi seinastu 30 árini.

Ídnaðarvinnan hevur tó stabiliserað seg nakað, og tað eru fleiri fyritøkur, sum hava rættiliga gott fótafesti á føroyska marknaðinum. Gleðiligt er, at tær hava stóran marknaðarpart í Føroyum, sjálvt um tær eru í sera harðari kapping við útlendskar vørur.

Rákið at keypa lokalt og at leggja dent á at nýta uppruna vørur er eisini komin hesum partinum av vinnuni til góðar. Serliga eru tað føroyskar matvørur, sum eru eftirspurdar lokalt, og er tað tilvitanin frá føroyskum kokkum og ferðavinnuni, sum framhaldandi viðvirkar til øktan

eftirspurning. Tá tað kemur til matvørur, sum eru annað enn fiskur, er tað tó trupult hjá føroyskum fyritøkum at víðka um sítt virksemi við útflutningi, tí londini kring okkum hava gjørt avtalu við t.d. ES um heilsufrøðiligar karmar fyri hesa framleiðslu. Slíka avtalu hava Føroyar ikki.

Fyrr í ár hevur Løgtingið framt umfatandi broytingar í matvørulógini við tí endamálið at tað skal gerast lættari at umseta matvørur serliga frá landbúnaðinum á føroyska marknaðinum. Hetta merkir eisini at matvørueftirlitið av hesi framleiðslu er sera lítið, og partar av vinnuni eru ikki álvuligir við støðuna. Tey virki, sum hava lagt orku í at liva upp til strong heilsufrøðilig krøv, óttast at hetta tekur støðið undan teirra framleiðslu.

Tá tað kemur til aðrar ídnaðarvørur so sum vaskievnir, prentlutir o.l., eru fyritøkurnar undir sera stórum kappingartrýsti frá útlendskum vørum. Framgongdin í samfelagnum annars sæst ikki væl aftur í hesum partinum av vinnuni.

# Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroyskt vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðar-karmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur umframt arbeiðsgevarasamskipanir limir. Arbeiðsgevarasamskipanirnar eru Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðju-felag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip. Fyritøkur, sum ikki hoyra til virkisøkini hjá teimum fýra arbeiðsgevarasamskipanunum, sum eru nevndar omanfyri, hava beinleiðis limaskap í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

**Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag:**

- **Felags sáttmálar fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini. Hesir tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.
- **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Harumframt virkar umsitingin í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum, partvíst gjøgnum samstarv okkara við vinnufeløg í grannalondunum og partvíst, tí at útlendsk feløg, sum vilja samstarva við føroyska vinnu, venda sær til felagið.
- **Politisk ávirkan:** Vinnunar vegna verður arbeitt við at ávirka allar tær lógir og reglugerðir, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Talan er her um yvirskipaðar vinnupolitiskar karmar, ikki serstakar karmar fyri ávísar vinnugreinar. Arbeiðsgevarafeløgini eru umboðað í nógvum ymiskum stýrum, nevndum og ráðum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara. Her gera sína ávirkan galdandi, so vinnusjónarmið vinna frama. Hettar tryggjar limum okkara, at tað eisini framyvir gerst liviligt hjá fólki við fyritakssemi og hugskotum. Feløgini gera sostatt alt fyri at ávirka skipanir, sum eru viðkomandi fyri vinnuna.
- **Kunning:** Føroya Arbeiðsgevarafelag veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskiftir og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði úteftir og gjøgnum føroyskar miðlar. Felagið skipar eisini fyri kunningartiltøkum fyri limunum. Hetta snýr seg í mestan mun um broytingar í lóggávu, sáttmálum o.l.
- **Fundir og orðaskifti** í vinnuni: Føroya Arbeiðsgevarafelag nýtir Vinnuhúsið sum miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti, og har verða bond knýtt millum leiðarar í privatu vinnunu - eisini tá Vinnuhúsið er karmur um vitjanir uttaneftir. Arbeiðsgevara-felagið setur eisini eftir tørvi arbeiðsbólkar at greina mál og stevnur fyri føroyska vinnu - mál og stevnur, sum ofta gerast hornasteinar í almenna vinnupolitikkinum hjá felagnum.

Lógir Føroya Arbeiðsgevarafelags og onnur kunning um felagið og Vinnuhúsið er lýst nærri á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

Nevnd Føroya Arbeiðsgevarafelags verður vald á árliga aðalfundinum. Í lógunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum av Vinnuhúsinum og bjóða vinnugreinafeløgum at húsast í húsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreina-feløgunum í Vinnuhúsinum.

# Hvør húsast í Vinnuhúsinum?

Í dag eru 14 virkin feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta hugsan, at tað hevur týdning at savna føroyska vinnu undir einum taki. Hetta fyri at føroyska vinnan skal hava sterkari samleika í samfelagnum gjøgnum felags umboðan.

**Arbeiðsgevarafeløgini eru:**

| Arbeiðsgevarafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | Marita Rasmussen |
| Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag) | Marius Thomassen |
| Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum | Esther Dahl |
| Føroya Prentsmiðjufelag | Esther Dahl |
| Reiðarafelagið fyri Farmaskip | Esther Dahl |

Høvuðsuppgávan hjá arbeiðsgevarafeløgunum er at føra sáttmálasamráðingar við fakfeløgini vegna limirnar og at ráðgeva limunum í sáttmála og arbeiðsmarknaðarspurningum.

Harafturat arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við arbeiðsmarknaðarmálum og yvirskipaðum vinnukørmum.

**Vinnugreinafeløgini eru:**

| Vinnugreinafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Havbúnaðarfelagið | Niels Winther |
| Føroya Ráfiskakeyparafelag | Niels Winther |
| Handilsvinnufelagið | Birita Johansen |
| KT-felagið | Marius Thomassen |
| Oljuvinnufelagið | Jórun Gardar |
| Samskifti | Jórun Gardar |
| Ráðgevarafelagið | Marita Rasmussen |
| Ferðavinnufelagið | Birita Johansen |

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein.

Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

## Føroya Reiðarafelagið og Felagið Nótaskip

Seinastu árini hevur Felagið Nótaskip leiga skrivstovu í Vinnuhúsinum og frá 1. mai 2013 eisini Føroya Reiðarafelag.

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag setur karmarnar fyri arbeiðið í Vinnuhúsinum.

Í nevndini sita:



## Bergur Poulsen, formaður

Bergur Poulsen er nevndar-formaður í Eystur- og Sandoyartunlar og nevndarlimur í øðrum fyritøkum í føroyskum vinnulívi. Bergur Poulsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Høgni Hansen, næstformaður

Høgni Hansen er stjóri í heilsølufyritøkuni Poul Hansen. Høgni Hansen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011 og sum næstformaður felagsins síðan tá. Høgni Hansen var eisini nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið.



## Kristoffur Laksá, nevndarlimur

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Hann er eisini nevndarlimur í Fiskaaling og hevur í nógv ár sitið í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Jón Sigurdsson, nevndarlimur

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Hann er eisini nevndar-limur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



## Atli Gregersen, nevndarlimur

Atli Gregersen er saman við øðrum eigari av fyritøkunum Luna, Fútaklettur og Fiskavirkinum. Atli Gregersen er stjóri í alifyritøkunum Luna og Fútaklettur. Atli Gregersen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011. Atli Gregersen er eisini nevndarlimur í Havbúnaðarfelagnum.



## Fróði Magnussen, nevndarlimur

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt í øðrum føroyskum fyritøkum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



## Bogi Jacobsen, nevndarlimur

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutnings-fyritøkuni Varðin Pelagic. Harumframt er Bogi Jacobsen nevndarlimur í P/F Varðin og P/F Fossá. Bogi Jacobsen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.